Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðul til Stuðulstoymið í Suðurstreymoy

Søkt verður eftir stuðli til Stuðulstoymið í Suðurstreymoy

Stuðulstænastan hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til brúkarar um alt landið.

Stuðulstoymið er ein tvørfakligur starvsfólkabólkur og heldur til í hølunum hjá Stuðulstænastuni í Løkjatúni 1 á Argjum.

Málbólkurin hjá stuðulstoyminum er heimabúgvandi fólk omanfyri 18 ár, ið hava ein skerdan sálarligan virkisførleika.

**Arbeiðið hjá stuðulstoyminum fevnir um:**
- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá brúkaranum.
- At bøta um møguleikan hjá brúkaranum at fáa eitt trygdarnet.
- At stimbra ígongdsetan av virksemi, ið brúkarin ynskir ella hevur tørv á.
- At geva ráð og vegleiðing í vanligum dagligum virki, so sum matgerð, reingerð, klæðnavask, handilsørindum, peningaviðurskiftum og øðrum, við atliti til, hvat tann einstaki brúkarin megnar.
- At vegleiða og samskipa samstarv við t.d. Almannastovuna, Økispsykiatriina, Psykiatriska Depilin og aðrar myndugleikar.
- At skipa so fyri, at brúkarin fær møguleikan at leggja gerandisdag sín soleiðis til rættis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.
- At arbeiða inni á Løkjukafeini ávísar dagar

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans og samstundis kann átaka tær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión.
- Vísir áhuga og virðing fyri brúkaranum og samstundis arbeiðir professionelt.
- Er stuðlandi og hjálpir brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum.
- Hevur eina positiva menniskjafatan.
- Hevur hug og hegni til at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi.
- Er opin, virkisfúsur og menningarkunnaður.
- Kann handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan.
- Er sterkur bæði til likams og sálar.
- Hevur eina viðkomandi útbúgving.

**Stuðulstænastan kann bjóða:**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp
- Samávirkan á gerandis uppgávur
- Kunning í arbeiðinum og supervision

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um eitt fast starv innan Nærverkið og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld-, og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar um starvið eru at fáa hjá økisleiðaranum Odu Jóhansdóttir, tlf. 554021 og deildarleiðaranum Regin Johansen, tlf. 360000.

Starvið verður sett 01.01.2008 ella skjótast aftaná.

Umsóknir skulu sendast til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
stílað.: Regin Johansen
Argjavegur 26
160 Argir

**Umsóknarfreist: 20. november.2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo


# FM í virkisfótbólti 2007

Høvuðsstuðul og vinnari av kappingini 2006

Húsavarðartænastan

Skipað verður fyri FM-kapping í virkisfótbólti í Gundadali leygardagin 10. november frá uml. kl. 9 til uml. kl. 18.

**Nakrar reglur fyri kappingina**
- Spælt verður á hálvum vølli
- Hvør dystur er 10 minuttir
- 7 leikarar eru á hvørjum liði + 5 skiftisleikarar
- Luttakandi leikarar mugu ikki hava spælt í Formuladeildini, 1. ella 2. deild ella í steypakappingini hjá FSF í ár
- Seinasta freist at boða frá luttøku er hóskvøldið 8. november.
- Luttøkugjaldið er 600,- kr. fyri hvørt lið
- Møguligur ágóði av kappingini fer til uttanlandsferð hjá B36-piltum 2008

Luttakandi lið skulu tekna seg til kappingina við at faxa lepan niðanfyri.

Fótbóltsfelagið B36 F.C. Tórshavn

Navn á liði/liðum

Arbeiðspláss

Kontaktfólk

Tel/e-mail

**FM í virkisfótbólti 2007**
**Faxa seðilin til B36 á Fax nr. 31 80 36 ella ring til 223331**

# Hjálparfólk/Assistentur

Við hesum verður søkt eftir einum hjálparfólki/assistenti til Smyril at seta í fast starv. Umsóknarfreistin er 16. novembur. Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Fundamentalisturin



Ein leikur um trúgv
"The Fundamentalist" eftir Juha Jokela

Eykasýningar verða á Meiarínum:

Týs. 6. nov. kl. 20 útselt
Hós. 8. nov. kl. 20 útselt
Ley. 10. nov.kl. 18
Mik. 7. nov. kl. 20
Frí. 9. nov. kl. 20
Sun. 11. nov. kl. 18 seinasta sýning

Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni í Havn tlf. 302425 ella við dyrnar ein tíma undan sýning.

www.tvazz.com